## Lawton og Deiggj

Orkestrið Deiggj, sum hevur røtur á Tvøroyri, kemur at spæla undir, tá John Lawton fer á pallin at syngja vælkendu løgini hjá Uriah Heep. John Lawton gleðir seg at koma til Føroya og hann hevur hoyrt mangt gott um Føroyar frá vinmanninum Ken Hensley, sum hann enn hevur samband við og spælir saman við. Deiggj hava nógv ár á baki og kenna væl tónleikin frá sjeytiárunum. Teir hava vant nógv seinastu mánaðirnar og fríggjakvøldið fara teir á flogvøllin at taka ímóti John Lawton, og síðani fara Deiggj og Lawton venja saman.



## Dýr donsk høvuðpína

10. hvør dani hevur høvuðpínu minst eina ferð um vikuna, og umleið 200.000 danir hava høvuðpínu hvønn dag. Tølini eru frá einum granskingarfelagi, sum eitur Dansk Hovedpine Selskab, skrivar blaðið 24timer. Granskararnir eru komnir eftir, at høvuðpína er orsøkin til tríggjar mió. sjúkradagar um árið í Danmark, og høvuðpína er sostatt ein tann mest vanliga pínuelvandi sjúkan í landinum. Men høvuðpínan er eisini ein samfelagstrupulleiki, siga granskararnir og vísa á, at tríggjar mió. sjúkradagar kosta samfelagnum smáar fimm mia. krónur í goldnum lønum.

# Søgan um eina gravkúgv

**Ósemja millum Landsverk og Fjarhitafelagið hevur havt við sær, at Landsverk síðsta mikudag setti eina gravkúgv soleiðis, at Fjarhitafelagið ikki fekk gjørt sítt arbeiði. Fríggjadagin komu boð frá løgregluni um at flyta gravkúnna, sum nú er flutt, men framvegis forðar arbeiðinum hjá Fjarhitafelagnum**

ÓSEMJA
*Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*



*Mynd: Jens Kr. Vang*



*Mynd: Álvur Haraldsen*

*Upprunaliga forðaði gravkúgvin ikki bara Fjarhitafelagnum at gera sítt arbeiði. Hon tók eisini útsýni frá bilunum, sum komu koyrandi út frá Sandvíkarhjalla. Fríggjadagin var gravkúgvin flutt soleiðis, at hon framvegis tænir sínum endamáli, men bilarnir hava nú fingið útsýni*

»Einaferð vóru tað nakrir vaksnir menn, sum ikki kundu semjast um, hvussu teir skulu gera arbeiði framvið einum vegi. Teir trættust aftur og fram, inntil annar teirra fann útav at forklaga fyri mammu. Sum allar aðrar fittar mammur kom henda og lurtaði, men helt so tað var frægast, at hesir menninir loystu sínar trupulleikar sjálvir. Og trupulleikin varð loystur við, at annar av monnunum tók ta størstu gravkúnna hann fann og setti hana fyri har, sum hin maðurin ætlaði at arbeiða.«

Soleiðis kundi einfalda og stutta søgan um gravkúnna við útkoyringina frá Sandvíkarhjalla ljóða. Ein søga, um hvussu Landsverk kendi seg noyddan til at seta eina fysiska blokadu upp fyri at steðga arbeiðinum hjá Fjarhitafelagnum, sum teir ikki mettu fara fram á skilagóðan hátt. Formaðurin í Fjarhitafelagnum hevur lurtað eftir pørtunum og vónar nú, at hesir finna eina loysn.

### Gravkúgv deyðsfella

Mikudagin fyri viku síðani setti Landsverk eina gravkúgv við vegjaðaran beint áðrenn innkoyringina til Sandvíkarhjalla. Við Portalin fríggjadagin segði Oyvindur Brimnes, stjóri í Landsverk, at gravimaskinan var sett har, fyri at fáa eina reaktión frá Fjarhitafelagnum, hvørt arbeiði framvið vegnum eftir hansara tykki hevur drigið alt ov langt út. Hetta segði hann í viðmerking, eftir at Portalurin hevði skrivað um gravkúnna, og skýrt hana at vera eina deyðsfellu, tá plaseringin av henni tók alt sýni norðureftir hjá teimum, sum skuldu koyra út frá Sandvíkarhjalla. Nakrar dagar seinni var gravkúgvin flutt soleiðis, at hon ikki longur tók útsýni frá bilførarum, men kortini framvegis tænti sínum endamáli, nevniliga at forða Fjarhitafelagnum at arbeiða víðari.

### Gravkúgv neyðloysn

Oyvindur Brimnes sigur, at tað var ein neyðloysn at brúka gravkúnna fyri at steðga arbeiðinum hjá Fjarhitafelagnum.

– Vit hava havt fundir har tað verður nikkað, men kortini koyrir alt í sama máta, og ferðslutrygdarviðurskiftir verða ikki hildin, sigur Oyvindur Brimnes. Hann sigur, at teir av hesum mistu álitið á Fjarhitafelagnum.

– Arbeiðið er alt ov nógv seinkað, man hevur ikki gjørt seg lidnan har sum man er, og heldur ikki fylgt teimum avtalum, sum eru gjørdar, greiðir Oyvindur Brimnes frá. Tískil vildu teir tryggjað sær, at rørini ikki verða bundin saman fyrr enn trygd kann veitast fyri, at arbeiði verður gjørt sum tað skal og innan fyri eitt vist tíðarskeið.

– Og tá teir ikki steðga, tá vit senda brævtil teir við boðum um hetta, so var neyðugt at fara fysiskt til verka, vísir stjórin í Landsverk á. Samstundis leggur hann dent á, at tað ikki er vanlig mannagongd hjá teimum, at fysiskt til verka á henda hátt, men at tað var ein neyðloysn.

### Gravkúgv kann flytast

Landsverk viðgongur nú, at gravkúgvin upprunaliga var eitt sindur býtt stillað, og at tað átti at verið eitt sindur betri umhugsað, tá henda varð plaserað.

– Men havandi í huga, at tað var inni í einum arbeiðsøki og at fólk tá skulu vísa serlig atlit, so var tað ikki katastrofalt, heldur stjórin í Landsverk. Oyvindur Brimnes greiðir frá, at teir vóru meldaðir til løgregluna fyri hetta, og eftir at hava tosað við hana, fluttu teir gravkúnna umgangandi, soleiðis at bilarnir fingu útsýni aftur, meðan gravkúgvin kortini tænti sínum endamáli.

Oyvindur Brimnes sigur seg tó rokna við, at tey fara at finna ein loysn í hesum máli.

– Treytin er altso, at vit koma á tal við fólki. Men so skjótt sum vit so hava fingið trygd frá Fjarhitafelagnum fyri, at nú verður alt gjørt innan eina ávísa tí og eftir føstum treytum, so flyta vit okkum aftur, sigur Oyvindur Brimnes.

### Gravkúgv undrar stjóran

Stjóri í Fjarhitafelagnum er Hans Christian Dam. Hann skilir ikki heilt hví Oyvindur Brimnes á Portalinum eftirlýsti eina reaktión frá Fjarhitafelagnum, tí júst henda sama morgun høvdu Landsverk og Fjarhitafelagið verið á fundi um akkurát hetta málið. Hann dugir heldur ikki at síggja nakra haldgóða grundgeving fyri, at seta eina gravkúgv upp og